# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Eik høvuðsstuðul hjá Fremad

**Eik Bank verður nú høvuðsstuðul hjá Fremad Amager. Ein góður eksponeringsmøguleiki hjá bankanum og eitt herðaklapp til okkum, sigur Todi Jónsson**

SAMSTARV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fremad Amager tekur nú enn eitt fet á leiðini at styrkja um grundarlagið undir felagnum.

Nýggjur sponsorsáttmáli er gjørdur, og hesin ger Eik Banka til høvuðsstuðul hjá felagnum, ið innan fá ár ætlar sær at takast við tey stóru í Danmark.

- Hetta er enn ein liður í okkara arbeiði at styrkja um felagið. Og sjálvandi eru vit fegin um nýggju avtaluna, sigur Todi Jónsson, sum er nevndarformaður í Fremad Amager A/S.

- Og sjálvandi vóna vit, at báðir partar fáa gagn úr hesum. Eik er jú virkið á danska marknaðinum, og eg ivist ikki í, at vit við hesum kunnu geva teimum ein góðan eksponeringsmøguleika, sigur Todi.

Eik hevur verið partur av føroyska konseptinum kring Fremad Amager síðan byrjan, og frá nýggjárinum verður tað altso í fremstu røð sum høvuðsstuðul.



*Menningin í Fremad Amager gongur við fullari ferð. Og nú stendur føroyskur høvuðsstuðul á odda fyri hesum*

### Styrkja hópin

Hóast felagið eftir seinasta kappingarár noyddist eina deild niður, so hevur hetta á ongan hátt tikið mótið frá leiðsluni í felagnum. Heldur er orkan nú brúkt til at betra enn meira um fortreytirnar, og ítróttarliga hevur gingið væl, nú felagið er á oddasessinum í deildini.

Men hóast hetta, so verður framhaldandi arbeitt við at styrkja um hópin. Venjarin hjá felagnum, Jacob Friis Hansen, hevur áður sagt, at felagið roynir at styrkja um hópin við spælarum, sum hava støði at standa seg í superliguni, og hetta váttar Todi Jónsson eisini. Men hann leggur dent á, at enn er ov tíðliga at siga nakað ítøkiliga um hetta.

- Men vit síggja longu nú, at vit hava lættari við at fáa fatur á spælarum, enn vit høvdu tað fyri bara hálvum ári síðani. So eg haldi, at gongdin higartil er tann rætta.

## U17-kvinnurnar til Turkalands

**Føroyar komu í bólk við Turkalandi, Írlandi og Hollandi í komandi undankapping fyri U17-kvinnur**

FÓTBÓLTUR
*www.football.fo*

Týsmorgunin var lutakast á høvuðsskrivstovuni hjá UEFA í Nyon, Sveits, um hvussu komandi undankapping fyri U17-kvinnur skuldi skipast.

Føroyar vóru við í lutakastinum, og tilvildin lagaði seg soleiðis, at føroysku kvinnurnar komu í bólk 5, sum skal spælast í Turkalandi. Turkaland og Føroyar lógu bæði í næsta pottinum yvir lond, ið ikki verða mett at vera millum tey sterkastu.

Úr tí sterka hópinum komu Írland og Holland.

Kappingin verður hildin í døgunum 16. til 24. oktober 2008. Hetta er heldur seint á árinum, men hetta var valt, tí at hitin kann vera nógvur í Turkalandi fyrr á árinum.

## U19-kvinnurnar til Portugal

**Føroyar komu í bólk við Portugal, Noreg og Rumenia í komandi undankapping fyri U19-kvinnur**

FÓTBÓLTUR
*www.football.fo*

Tað var eisini lutakast til komandi U19 undankappingina fyri kvinnur í Sveits í dag (týsdagur 11. desember 2007).

Føroyar komu í bólkin, sum skal spælast í Portugal. Portugal var styrkimett millum tey sterkastu, og úr tí pottinum kom eisini grannatjóð okkara, Noreg. Fjórða tjóðin í okkara bólki, Bólki 1, verður Rumenia.

Kappingin hjá føroysku U19-kvinnunum verður spæld í Portugal í døgunum 24. september til 2. oktober 2008.

## Súni umhugsar at rýma

**Verður talan ikki um meira spælitíð í AaB, ætlar føroyski landsliðsspælarin sær at leita til annað felag**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tríggir dystir á besta liðnum seinasta hálva kappingarárið. Tað er støðan hjá Súna Olsen, sum hevur sáttmála við AaB, sum er oddalið í donsku superliguni.

Og hóast góðu gongdina í felagnum, so er hetta ikki nøktandi hjá Súna Olsen. Og við heimasíðuna, www.bold.dk, sigur hann, at hann nú umhugsar framtíðina í felagnum.

- Eg passi arbeiðið hjá mær so væl, sum eg kann, men um tað ikki hendir okkurt næsta hálva árið, so leingi eg ikki sáttmálan við AaB, sigur Súni Olsen, sum hevur spælt tríggjar dystir á besta liðnum í heyst, men annars hevur spælt fyri 2. lið hjá AaB.

- Tríggir dystir eru ikki nóg gott fyri meg. Vit hava staðið okkum væl við 2. deildarliðnum, men mín ambitión er ikki at spæla í 2. deild. Eg vil spæla í toppinum, sigur Súni Olsen við bold.dk.

Í fjør summar longi Súni Olsen sátmálan, sum hann hevði við AaB. Hesin gongur út í komandi summar, og hevur spælarin soleiðis fritt at fara, um nýggjur sáttmáli ikki er gjørdur við AaB innan ta tíð.